**Tjóðveldi**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 91/2013: Uppskot til samtyktar um stuðulsskipan at eggja privatfólki og vinnufyritøkum at útvega sær grønar hitaskipanir til upphiting av sethúsum og bygningum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um stuðulsskipan, sum skal eggja privatfólki og vinnufyritøkum at útvega sær grønar hitaskipanir til upphiting av sethúsum og bygningum.

## Viðmerkingar

Árliga innflyta vit fyri 1,2 milliardir krónur í olju. Fyri flestu húsarhald er oljan til at hita sethúsini við ein tyngjandi partur av føstu útreiðslunum. Mong ynskja at leggja um til alternativar hitaskipanir, sum hita húsini við sonevndari grønari orku. Húsarhaldini kunnu, sum frá líður, spara nógvan pening, umframt at varandi orkukeldurnar minka munandi um útlátið av CO2. Eitt annað mál við at leggja um til grøna orku er at framtíðartryggja føroyska búskapin móti óstøðugum og, sum frá líður, vaksandi oljuprísum.

Í breiðari politiskari semju ímillum allar flokkar samtykti Løgtingið í desember 2009 at skerja útlátið av CO2 við í minsta lagið 20% fram til 2020 og gera miðvís átøk at røkka málinum at gerast leysari av steinrunnum brennievnum (tingmál nr. 38/2009).

Millum annað samtykti Løgtingið, at: *"Føroyar vilja fíggjarliga stuðla og skunda undir menning, royndir og uppsetan av alternativum orkuskipanum, ið byggja á varandi orkukeldur, sum kunnu gagnnýtast heima og úti í heimi".*

Á leið ein triðingur, og størsti einstaki parturin av oljunýtsluni í Føroyum, fer til at hita sethús og bygningar. Tí er hetta millum týdningarmestu átaksøki til tess at røkka málinum um at gerast so leys, sum til ber, av oljuni, og í hesum sambandi at leggja um til eitt ravmagnsrikið heldur enn oljurikið samfelag.

Fíggjarligar gularøtur sum stuðulsskipanir og grøn avgjøld/avgjaldsskáar hava aðrastaðni víst seg at vera sera virkin  amboð at eggja húsarhaldum og vinnuni at minka um oljunýtsluna og harvið útlátið av CO2. Slík fíggjarlig stýringsamboð fáa tingini at ganga munandi skjótari. Í grannalondum okkara og ES-londunum finst tí ein røð av ymiskum grønum stuðulsskipanum.

Ein fíggjarligur vinningur eggjar sethúsaeigarum og vinnulívi til skjótari at gera íløgur í orkusparandi og reina orku. Tað ber til í dag at fáa bílig orkulán úr Húsalánsgrunninum til at bjálva og gera íløgu í grønar hitaskipanir til sethús. Men ikki øll kunnu fáa hesi lán; og tað er framvegis sera kostnaðarmikið og tí tungt hjá húsarhaldunum at gera íløgur í eitt nú jarðhitaskipan til at hita húsini.

Á vári 2009 tók eitt samt Løgting undir við uppskoti frá Tjóðveldi (tingmál nr. 134/2008), og Løgtingið heitti tá á landsstýrið um at koma við einari ætlan fyri millum annað:

- Uppskot um, hvussu landsstýrið í sínum fíggjarlógaruppskoti fyri 2010 og komandi árini kann seta munandi upphædd av til menning av varandi orkukeldum.
- Uppskot um, hvussu almennar stuðulsskipanir til bygging, umbygging, húsakeyp o.l. verða umlagdar soleiðis, at tær stimbra húsarhaldum og vinnuni at spara orku og royna varandi orkukeldur sum hitaskipan til hús og bygningar.

Løgtingið hevur sostatt fleiri ferðir víst vilja til veruliga at stuðla undir umskipanina til grøna orku.

Men higartil er tað ein sannroynd, at ov lítið er hent og pengar ikki hava fylgt góða viljanum. Tvørturímóti, so stóðu munandi fleiri pengar á fíggjarlógini í 2009 til endamálið, enn tað gera í 2014, har eitt nú kontan til stuðul av alternativum grønum orkuverkætlanum, sum upprunaliga var 5 milliónir, stigvíst er minkað burtur í einki.

Vónandi ber til at venda hesum hugburði, tí uttan munandi fíggjarligar raðfestingar, sum veruliga kunnu seta gongd á, so gongur umleggingin alt ov seint.

Tað eigur tí at verða gjørd ein skipan, sum beinleiðis stuðlar íløgum í grønar orkuskipanir at hita sethús og bygningar. Tað eru fleiri mátar at gera hetta uppá, eitt nú:
Beinleiðis stuðul til at gera íløgur í grønar hitaskipanir – sum hitapumpuskipanir (jarðhita, sjóhita, luft-vatn, luft-luft, o.l), sólorku, biobrenni, vindorku og annað.

Ein annar møguleiki er prísstuðul, so streymur frá grønum orkuskipanum gerst bíligari fyri brúkaran, eins og mvg-frítøka ella tað, at grønar íløgur kunnu dragast frá í skattinum, eisini kann vera partur av stuðulsskipanini.

Flokkarnir á tingi og landsstýrið finna vónandi eina breiða semju um, hvør leistur skal veljast. Tað avgerandi er, at stuðulsskipanin eggjar húsarhaldum og vinnu at leggja um til grøna orku.

Neyvar ásetingar eiga sjálvsagt at verða gjørdar fyri, hvørjar skipanir, ið kunnu stuðlast, soleiðis at stuðulsskipanin kemur at gera størst møguligt gagn.

Munagóð upphædd eigur at verða sett av til endamálið á komandi fíggjarlógum.

**Á Løgtingi, 28. februar 2014**

Bjørt Samuelsen
løgtingskvinna